

*Føroyski landsliðshópurin, sum tók lut í CHM-kappingini í Føroyum í februar 1980: Aftast frá vinstru: Jógvan L. Nolsøe, Páll Poulsen, Echard Persson, Niels Nattestad, Dánjal J. Andreassen, Regin Johansen, Kristin Johansen, Mortan Mørk, Finn Bærentsen og Heðin Mikkelsen, liðleiðari.*
*Fremst frá vinstru: Sofus Rubeksen, formaður, Kári Mortensen, Eyðfinn Egholm, Djóni Dalsgarð, Hanus Joensen, Kristoffur Ragnarsson, Palli Joensen, Sverri Jacobsen og Petur S. Rasmusssen, venjari.*

*mynd: Árið ið fór 1980*

# 25 ár síðani CHM-kappingina í Føroyum

**Í dag eru 25 ár síðani, at CHM-kappingin í hondbólti var sett í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Føroyar gjørdust nummar seks av teimum tíggju luttakandi tjóðunum**

HONDBÓLTSMINNIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mong eru tey, sum minnast aftur á tiltiknu CHM-kappingina í hondbólti, sum var í Føroyum á vetri í 1980. Í dag eru júst 25 ár síðani, at kappingin var sett.



*Kári Mortensen í skotroynd í dystinum móti Luxembourg, sum Føroyar vann 21-17. Kári gjørdist besti málskjútti í HM-kappingini við 47 málum, og fyri hetta bragd fekk hann ein grindaknív sum gávu.*

*mynd: Árið ið fór 1980*

### Stinnir føroyingar

Føroyska liðið stóð seg væl í kappingini. Teir vóru í bólki saman við Noreg, Eysturríki, Luksembourg og Italia. Fyrsti dysturin var móti Italia, og tá taptu okkara menn við einum máli, 24-23.

Bert tann eini sigurin fekst til høldar í bólkaspælinum, og var hann á Luksembourg, sum noyddist at leggja rygg til eitt 17-21 tap fyri føroyingum. Hóast bert tann eina sigurin, so eydnaðist tað føroyingunum at gerast nummar trý av teimum fimm liðunum í bólkinum, tí at bólkurin var so javnur.

Tískil vóru okkara menn í dysti við portugisar um fimta og sættaplássi í kappingini, og her vunnu portugisar greitt 34-25. Sostatt endaði føroyska liðið sum nummar seks av teimum tíggju luttakandi tjóðunum, og tað kann ikki sigast at verða annað enn stak gott.

### Sterkar tjóðir

Millum tær tjóðir, ið tóku lut í CHM í 1980 í Føroyum, vóru eitt núNoreg og Frakland. Hetta eru tjóðir, sum í dag eru millum tær fremstu í hondbóltsheiminum. Bæði Noreg og Frakland eru við til HM-endaspælið í manshondbólti, sum í hesum døgum er í afrikanska landinum Tunis. Fraklendingar hava harumframt verið heimsmeistarar fleiri ferðir seinnu árini, so teir hava ment seg nógv hesi seinastu 25 árini, kann sigast.

### Kári gjørdist toppskjútti

Umframt góða úrslitið sum nummar seks í kappingini vunnu føroyingar eisini ein annan heiður. Navnframi vestmenningurin Kári Mortensen gjørdist nevnliga toppskjútti í kappingini við 47 málum í teimum fimm dystunum, og fyri hetta bragd fekk hann ein grindaknív í gávu.

Kári var tá ein ungur maður, men hóast 25 ár eru fráliðin, so er tað ikki fyrr enn nú, at hann er givin sum spælari í bestu deildini her heima.